# Rætta útbúgvingin er avgerandi

**Nú líður væl til, at freistin at søkja á skúlar, er úti. Allir skúlar koyra við lýsingarherferðum fyri at fáa so nógvar umsøkjarar sum tilber. Tveir mans, sum hava gingið á Tekniska skúla í Klaksvík fyri níggju árum síðani, eru í dag lidnir við teirra framhaldandi útbúgvingar, og teir siga, at tað ræður um at velja tað, sum er rætt fyri ein sjálvan**

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Høgni Kastalag og Svein Rógvi Nielsen, sum fyri níggju árum tóku HT prógv á Tekniska skúla í Klaksvík siga, at tað kann hava stóran týdning fyri framhaldandi útbúgving, at ein velur røttu miðnámsútbúgvingina*

**Klaksvík:** Nógvir skúlar lýsa í hesum døgum, har tey royna at fáa ung at søkja inn á skúla til komandi skúlaár. Mangir eru hættirnir, sum nýttir verða at fanga áhugan hjá ungfólkum og øðrum, sum hava ætlanir um at røkka einari miðnámsútbúgving.

Í 1993 byrjaði ein nýggj útbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík, sum kallaðist Hægri Tøkni. Ein teknisk studentarútbúgving, har møguleikar eru fyri at arbeiða í verkstøðum, umframt vanligu lærugreinirnar, sum eiga og skulu til.

Høgni Kastalag og Svein Rógvi Nielsen vóru tveir av næmingunum, sum gingu í fyrsta HT flokkinum á skúlanum.

Hetta var í 1993 og sum sagt fyrsta árið, at Hægri Tøkni útbúgvingin kundi takast á skúlanum.

## Verkætlanir menna

Teir báðir Høgni og Svein Rógvi, sum ávíkavist eru úr Klaksvík og Havn, siga, at útbúgvingin hevur havt nógv at siga fyri teir báðar í teirra framhaldandi útbúgvingum, og eru teir tískil sannførdir um, at HT var teirra rætta val. Høgni er í dag arkitektur, og Svein Rógvi eksport-teknikkari, sum er ein útbúgving innan sølu og tænastu.

– Tað er hetta við verkætlanar og bólkaarbeiðinum, sum hevur havt ótrúliga stóran týdning fyri meg undir mínari útbúgving sum arkitektur, sigur Høgni.

Svein Rógvi nikkar samtykkjandi og leggur afturat, at somuleiðis eru umstøðurnar í Klaksvík góðar. Her hugsar hann, um ein kemur aðrastaðnis frá til Klaksvíkar at ganga í skúla.

Svein Rógvi er havnarmaður og er helst best kendur innan hondbóltin. Síðani hann varð liðugur á HT hevur hann nomið sær útbúgving sum eksport-teknikkari og annars verið professionellur hondbóltsvenjari. Ítróttur hevur altíð havt sera nógv at siga fyri hann, og heldur hann, at tað var sera gott fyri hann at koma til Klaksvíkar tann tíð tað var.

– Her eru góðar umstøður fyri ítróttinum, so tað bar væl til hjá mær at hava ítriv av ymsum sløgum við síðuna av dagligu skúlagongdini. Tað var nakað, sum vigaði tungt í míni avgerð fyri at koma hendanvegin, greiðir Svein Rógvi frá.

## Alt broytist

Teir báðir ásanna tó, at miðnámsskúlarnir íd ag helst allir eru nógv broyttir, síðani teir lótu dyrnar aftur á Tekniska skúla fyri seinastu ferð í 1995.

Tekniski skúlin í Klaksvík er mentur meira síðani tá. Og teir vita, at aðrir miðnámsskúlar eisini arbeiða við smærri verkætlanum gjøgnum útbúgvingarskeiðið. Tá teir báðir gingu á HT vóru tríggir verkstaðir, sum veljast kundi ímillum. Í dag eru tveir verkstaðir komnir afturat, og tað halda teir er avbera gott fyri skúlan.

Báðir siga teir, at tað góða við júst Tekniska skúla, eru nevniliga verkstaðirnir. Hetta halda teir lata upp fyri møguleikum at menna seg innan eitt ávíst øki, um ein vil tað.

– Og tað kann koma einum væl við í einari framhaldandi útbúgving, siga teir báðir Høgni Kastalag og Svein Rógvi Nielsen, sum leggja dent á, at tað ræður um at velja rætt, tá ein fer undir miðnámsútbúgving.

# NCC setur búgv

**Ímeðan tey fyrstu skotini verða latin av í sambandi við arbeiði við inntakinum til Norðoyatunnilin, verður eitt øki við Skálan í Klaksvík planerað og gjørt klárt til skúrar og annað, sum arbeiðsfólk hjá NCC skulu búleikast í**

BYGGING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Eitt nýtt fyribils grannalag verður nú bygt í Klaksvík. NCC er í ferð við at gera eittøki við skúrum, har teirra arbeiðsfólk skal búgva og annars halda til, tá teir ikki eru í tunlinum*

**Klaksvík:** Yvir av eldrasambýlinum á Bøgøtu arbeiða menn við at gera eitt øki klárt til fólk frá NCC at búleikast í, meðan arbeiðið upp á norðoyatunnilin fer fram. So nú fara tey eldru fólkini at fáa aðrar grannar enn matvøruhandil, svimjihøll, ítróttarhøll og dansihøli.

Skúrar verða settir upp til einar 20 mans at búgva í, meðan arbeiðið upp á undirsjóvartunnilin fer fram. Eisini verður ein kantina har.

NCC vendi sær til Klaksvíkar kommunu og spurdi, um kommunan kundi leiga teimum eitt øki til arbeiðsfólkið at búleikast í. Teir vildu helst hava eitt stað, sum liggur nakað burtur frá arbeiðsøkinum í Borðoyarvík.

Kommunan vísti teimum á trý ymisk støð, har eitt tilhaldsøki kundi gerast, og valið fall so á økið millum Skálan og KÍ høllina.

Steinbjørn Jacobsen sigur, at einasta treyt frá kommununi var, at teir ikki koma inn á økið, har ætlanin er at gera nýggja badmintonhøll í býnum.

NCC ger alt arbeiðið sjálvir, og hava teir fingið at vita, at økið skal latast kommununi aftur í sama standi, sum tað var í frammanundan, um ikki kommunan til ta tíð hevur aðrar ætlanir við økinum.

## Arbeiðsøki

Uppi við Borðoyavík gongur arbeiðið væl nú. Tað var nakað tarnað av kavanum, sum var herfyri, men nú er ferð sett á. Sum sagt varð fyrsta skotið fyri inntakinum latið av mánadagin, og nú verður ferð sett á tað arbeiðið fyri at klárt skal verða at lata tað fyrsta skotið av til sjálvan tunnilin. Ætlanin er, at tað arbeiðið skal byrja eftir páskir.

Eitt øki sunnan fyri bátahylin í Borðoyavík skal fyllast út og nýtast sum arbeiðsøkið hjá Føroya Konsortium. Einir 30.000 ella 40.000 rúmmetrar skulu fyllast har, og tað er tað fyrsta, sum verður gjørt, áðrenn farið verður í holt við at fylla aðrastaðni sambært ætlanum hjá Klaksvíkar kommunu.

NCC ger sum sagt sjálvt alt arbeiðið við at fáa eitt búpláss til síni arbeiðsfólk, og alt er upp á teirra egnu rokning.

– Væntandi verður búøkið klárt at taka í nýtslu seinast í hesum mánaðinum, sum eg havi skilt tað, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.



# Eri ímóti at knýta dans og skeinking saman

**Ragnar Olsen, býráðslimur í Runavíkar kommunu, var ein av teimum fýra, sum atkvøddi ímóti at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi. Hann heldur ikki, at málið er nóg væl lýst frá teirri síðuni, sum var ímóti at geva hetta loyvi. – Eg eri ímóti at fíggja ungdómsvirksemi við skeinking, sigur hann**

DANSUR OG SKEINKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ragnar Olsen sigur, at kvota er í Runavíkar kommunu til tvey skeinkiloyvi, harav annað er fingið í hesi býráðssetuni. John's Resturant hevur annað loyvi, meðan hitt framvegis liggur hjá loyvisnevndini.

- Kommunan søkti um hetta loyvi, tí vit høvdu eina umsókn liggjandi um matstovuvirksemi saman við einum skeinkiloyvi. Við tað, at talan var um eitt skeinkiloyvi við atliti til eina matstovu, var meiriluti í býráðnum fyri at søkja um eitt loyvi aftrat. Kenneth Rasmussen, sum søkti kommununa um dansi- og skeinkiloyvi fyri umleið hálvum ári síðan, veit ivaleyst, at kvota er til eitt loyvi aftrat.

## Stórur munur

Ragnar leggur dent á, at í hansara hugaheimi er stórur munur á at samtykkja eitt skeinkiloyvi, sum er knýtt at matstovuvirksemi og so at játta eitt skeinkiloyvi, sum er knýtt at einum dansiloyvi.

- Var talan í sínari tíð um at søkja um skeinkiloyvi til dansivirksemi, hevði eg ikki atkvøtt fyri, sigur hann.

Men hví er býráðslimurin so ímóti, at eitt skeinkiloyvi verður knýtt at dansivirksemi?

- Jú, eg meti, at her er ein stórur munur. Eg haldi tað generelt vera sera óheppið at knýta skeinking at dansi, har ungdómur samlast. Tað hevur víst seg í fleiri førum, at hetta sampakkar ikki væl. Vit hava eitt talandi dømi um hetta her í kommununi, tá ið Stokkastovan hevði dans og skeinking. Hetta bleiv til eitt bøli, sum løgreglan mátti steðga.

Ragnar leggur dent á, at hann er ímóti at knýta skeinking og dans saman.

- Tað eru tey, sum siga, at tað ber ikki til fíggjarliga at hava eitt dansistað og onnur tiltøk fyri ung uttan so, at loyvt er at skeinkja. Men hetta hongur als ikki saman, og eg haldi, at hesi argumentini eru ótrúliga langt úti. Tað kann væl ikki vera rætt, at brennivín og øl skulu fíggja okkara ungdómsvirksemi. Hetta stríðir ímóti míni sannføring.

Býráðslimurin heldur, at viðurskiftini eru heilt onnur, tá ið talan er um matstovuvirksemi og skeinking, tí tá gongur alt fyri seg á friðarligan hátt.

- Tað kann ikki samanberast at eta eina máltíð við onkrum leskandi aftur við - og so at knýta skeinking at dansi, har ungdómur samlast.

Ragnar ivast ikki í, at ein stórur partur av fólkinum tekur undir við hesum sjónarmiði.

- Um hesi eru ein meiriluti ella minniluti, dugi eg tó ikki at siga.

Tað eru tey, sigur Ragnar, ið vísa á, at vit sum kommunalpolitikarar eiga at taka hædd fyri øllum áhugamálum í eini kommunu.

- Hetta er sjálvandi rætt – nakað langt, men vit eiga so altíð at arbeiða og taka avgerðir sambært okkara sannføring sum politikarar. Kanska eru vit vald – júst tí, vit hava ein ávísa sannføring, sigur hann.


*- Tað kann ikki vera rætt, at brennivín og øl skulu fíggja okkara ungdómsvirksemi. Hetta stríðir ímóti míni sannføring, sigur Ragnar Olsen, býráðslimur í Runavíkar kommunu*

## Bilkoyring

Tað eru eisini tey, sum hava ført fram, at sleppur ungdómurin ikki at hugna sær við dansi og drekking í Runavíkar kommunu, so fara tey bara av oynni, eitt nú til Havnar, og tað førir við sær, siga tey, at bilarnir verða rullandi barrir.

- Sjálvandi er tað ikki nakað, sum eg ynski, at ungdómar koyra langar vegir á náttartíð. Men eg dugi ikki rættiliga at síggja munin – at fólk í bili leita higar, tí her eru dansur og skeinking í mun til, at okkara ungdómur leitar aðrar vegir. Vandin er jú hin sami – antin tað er teirra ella okkara ungdómur, sum setir seg í bilin.

Ragnar trýr heldur ikki teirri grundgeving, at verður dansur við skeinking í Runavíkar kommunu, so verður harvið eisini minni koyring.

- Eg trúgvi ikki, at ungdómar generelt ringja heim til foreldrini, tá ið líður móti morgni og siga: "Eg eri fullur, kemur tú eftir mær!"

Býráðslimurin vísir eisini á, at sambært rúsdrekkalógini hava ungdómar undir 18 ár ikki loyvi at vitja dansistøð, har skeinking fer fram.

- Vit kunnu skjótt koma í ta støðu, at ungdómar savnast við tílík støð við tí fyri eyga at fáa onkran, sum hevur neyðuga aldurin, at keypa sær rúsdrekka út við, og tað er líka so ólógligt, sum tað er at skeinkja til ungdóm undir 18 ár, sigur Ragnar Olsen.

# Dansi- og skeinkiloyvi í Runavíkar kommunu

DANSUR OG SKEINKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ikki sørt av kjaki hevur verið í bløðunum um, at ein meiriluti av býráðslimunum í Runavíkar kommunu gingu ímóti umsóknini hjá Kenneth Rasmussen um dansi- og skeinkiloyvi.

Av teimum níggju býráðslimunum, atkvøddu fýra fyri at geva Kenneth hetta loyvi, meðan fýra vóru ímóti. Ein atkvøða – atkvøðan hjá Hans Jakku Lamhauge – var blonk. Tískil fall málið undir atkvøðugreiðsluni á býráðsfundi, 26. februar.

Undan atkvøðugreiðsluni í býráðnum, hevði fíggjarnevndin havt málið til viðgerðar, og eina viku fyri endaligu støðutakanina, hevði fíggjarnevndin eisini fund við umsøkjaran.

Í fíggjarnevndini í Runavíkar býráði sita býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen, Ragnar Olsen og Sæunn Hansen.

Við tað, at býráðsformaðurin eigur í bygninginum á Høgabóli, sum Kenneth hevði ætlanir um at leiga til endamálið, metti Rodmundur seg ikki at vera luttøkuføran. Tískil tók varabýráðsformaðurin, Hans Petur Ellingsgaard, sessin hjá Rodmundi í fíggjarnevndini.

Vanliga tekur fíggjarnevndin støðu í ymisku málunum og ger tilmæli til býráðið, men í hesum førinum hevði nevndin tó einki endaligt tilmæli til avgerandi býráðsfundin. Í fyrsta lagi var nevndin ikki samd, og haraftrat varð mett, at býráðslimirnir annars høvdu ymiskar meiningar um málið. Tískil varð hildið rættast, at avgerðin varð tikin á sjálvum fundinum.

Hóast býráðsformaðurin metti seg ikki at vera luttøkuføran undir viðgerðini í fíggjarnevndini, atkvøddi hann á býráðsfundinum, 26. februar, fyri at geva Kenneth Rasmussen prinsipielt dansi- og skeinkiloyvi.

Í samrøðu við onnur bløð hevur Rodmundur Nielsen sagt, at tað var býráðið, sum kravdi, at hann kom inn á fundin at atkvøða í málinum.

Søgan er hon, at býráðið varð biðið um at taka støðu til, um Rodmundur var luttøkuførur ella ikki. Tá ið atkvøtt varð, vóru allir býráðslimirnir fyri – uttan Ragnar Olsen, sum atkvøddi ímóti.


*Ætlandi verður borgarafundur í Runavíkar kommunu mikukvøldið í komandi viku. – Vit mótmæla viðgerðini í býráðnum av málinum um dansi-og skeinkiloyvi, siga stigtakararnir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Borgarafundur um dans og skeinking

**Fólk í Runavíkar kommunu, sum eru misnøgd við avgerðina hjá meirilutanum í býráðnum, arbeiða nú við at fáa í lag ein borgarafund í Glyvra skúla**

BORGARAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum skilst, eru fólk í Runavíkar kommunu, sum eru ímóti býráðsavgerðini um at sýta Kenneth Ramussen dansi-og skeinkiloyvi, í holt við at skipa fyri einum borgarafundi í kommununi, sum ætlandi verður í Glyvra skúla komandi mikukvøld kl. 19.

Yvirskriftin yvir fundin er "Trivnaður í Runavíkar kommunu", men í brævi, sum býráðslimir hava fingið, skilst, at borgarafundurin eisini skal síggjast sum eitt mótmæli ímóti viðgerðini, ið umsóknin hjá Kenneth Rasmussen hevur fingið.

Líkt er eisini til, at fólk eru í holt við at savna inn undirskriftir, sum ætlanin er at handa býráðnum, tí í nevnda brævi eru reglur strikaðar, har fólk kunnu skriva undir mótmælið.

Býráðslimir, sum vóru ímóti at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi, hava fingið persónlig brøv, sum eru send á privatar adressur. Aftrat hesum hava lesarabrøv verið í bløðunum, har borgarar hava mótmælt avgerðini hjá einum meiriluta í Runavíkar býráði.

Sosialurin fer at venda aftur til ætlaða borgarafundin.